# Kom, lat okkum syngja

Kom, lat okkum syngja
og hugin uppyngja,
vit kvinnur og menn.
Hvat hugar oss betur,
nú strangligur vetur
hann herjar enn.
Vit gloyma alt gerandis slabb og stríð
og lyfta oss droymandi burtur úr tíð.

So hittast vit aftur
og eru væl sættir
við búgvið borð.
Her blíðskap at njóta,
hann ikki man tróta,
tað prógvar gott orð.
Várt felag at heiðra í hetta kvøld
og vóna, at dansurin livir í øld.

Sum kvøldinum líður,
og borðhald umsíður
at enda er.
Í hendur vit taka,
í dansin oss blaka,
sum rímiligt er.
Vit dans okkar meta sum dýrasta skatt,
vár mentanararvur úr ætt í ætt.

Við Orminum Langa
vit fara um tanga,
um firðir og sund.
Vit við teimum grøtast,
tá høgg teimum møta
í orrustustund.
Tá teir leggja knørrin við knarrarborð,
vit stíga tá treystari fótin á orð.

Við Rólanti fríða
í Runtsival ríða
við Dýrindal.
Tá keisarin treyður
sær, Rólant er deyður,
hann gevst á val.
Vit Gýðin jall, svíkajaran, taka tá
og lata hann har millum hestar slá.

Tað Skrímslið í talvi
vit royna við alvi
at vinna á.
Tá tap er at daga,
lat handskarnar draga
á hendi tá.
Vit frøast um risans, tann tunga harm,
alfast svevur bóndin á brúðar arm.

Um ómenni vigin,
nógv fet eru stigin,
vit gevast ei so.
Tí áðrenn vit enda,
til hallar heim venda,
vit geva tey boð,
um dansin at lívga, ei spara vár skó,
so skal Gud vár ráða for næstu jól.

Jacoba Funding yrkti til Eysturoyar dansifelag okt. 1989, tá felagið var 30 ár.